

*Teldutekning av nýggja Toyota Corolla Hatchback við fimm hurðum*

# Nýggjur Corolla í 2006

**Væntandi kemur ein nýggjur Toyota Corolla á marknaðin komandi ár. Talan verður um 10. generatión av Corolla, sum sigst at vera heimsins mest seldi bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Generation X eitur konseptbilurin, ið væntandi kemur á marknaðin sum Toyota Corolla næsta ár.

Hóast talan verður um ein heilt nýggjan bil, kemur designið at minna rættuliga nógv um núverandi Corolla.

Bilurin verður bygdur yvir ein nýggjan plattform, sum eisini skal nýtast til ein nýggjan Toyota RAV4.

Bilurin kemur sum hatchback við trimum og fimm hurðum, eins og sum sedan og stationcar. Nýggir bensin- og dieselmotorar vera eisini á skránni.

*Kelda: FDM*

# Størri Audi A4 um tvey ár




*Spiónmyndin her vísir tann nýggja Audi A4, ið er goymdur innan fyri karossaríið á núverandi A4, hesin er bert gjørdur størri*

**Spiónmyndir vísa, at næsta generatión av Audi A4, sum væntandi kemur á marknaðin um umleið tvey ár, verður ein størri enn bilur enn dagsins A4**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Minni enn eitt ár eftir at Audi A4 fekk eina størri facelift, verður longu nú arbeitt við at tekna ein nýggjan A4, sum væntandi kemur á marknaðin um eini tvey ár.

Bilurin verður umleið 10 cm longri og 5 cm breiðari enn tann núverandi A4.

Motorurin kemur at standa upp á tvørs, eins ogá nýggja VW Passat, og møguleiki verður eisini fyri eini 4x4 Quattro útgávu.

*Kelda: FDM*

## Virus kann hótta bilarnar

**Bilar kunnu í framtíðini verða eitt álopsmál hjá teldusníkum, sum t.d kunnu fóðra innbygdu kunningarskipanina við virus og óreinum kodum, skrivar tíðindastovan Reuters**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Tess meira kunningartøkni verður sett í nútímans bilarnar, tess meira viðbreknir verða teir. Tí kunnu bilar í framtíðini blíva eitt mál fyri tey fólk, ið hava til frægd at framleiða virus.

Til dømis kann ein bilur við tráðleysarum sambandi, har til ber at flyta telefonsamrøður ella tónleikafílar til tónleikaútbúnaðin í bilinum, verða eitt mál hjá hesum virusframleiðarum. Hesir persónar kunnu t.d. fóðra ta innbygdu kunningarskipanina við virus og óreinum kodum, skrivar tíðindastovan Reuters.

Um telefonskipanin og teldan í bilinum brúkar somu datakanal, merkir tað, at teldusníkar fyrr ella seinni vilja finna út av, hvar hesar skipanir eru mest viðbreknar og misnýta tær.

Enn hevur eingin bilframleiðari sagt frá um virus-trupulleikar í bilum, men hesum verður bilídnaðurin noyddur at halda eitt vakið eygað við, siga leiðandi virusgranskarar.

*Kelda: transportnyhederne.dk*